# Bilar

Nr. 136 • hósdagur • 19. juli 2001 • 75. árg.

# Honda Civic 5/h - brýtur við alla vanahugsan




*Birgir Dam Jacobsen frá Norðbil væntar sær nógv av nýggja Honda Civic, sum er kappingarførur í prísi og dygd*

**Frá at byrja sum ein minibilur í 1972, er Honda Civic vaksin til ein stóran og rúmligan familjubil, sum nú í 7."generatión" brýtur við alla vanahugsan um ein Honda persónbil**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Sjáldan hava vit upplivað eina so kollveltandi broyting av einum bilmodelli, sum nú Honda Civic við 5 hurðum er komin á marknaðin sum ein rúmligur fimm persóna bilur í sonevnda Golf-klassanum. Hetta er ein bilur sum væntandi kemur at klára seg væl í hørðu kappingini.

### Slætt dúrk

Í mun til fyrra Civic situr man hægri, fronturin er stytri og útsýnið sera gott. Tað at bilurin er stuttur frammanfyri forrútin, ger sítt til at plássið er betri til tey ferðandi og viðførið. Civic hevur eitt nýtt upphang framman og aftan sum eisini tekur minni pláss undir dúrkinum. Hetta, og tað at gearstongin er flutt upp í instrumentborðið, hevur við sær at dúrkið er heilt slætt og lætt er at koma runt í bilinum.

### Trygg konstruktión

Tað at Civic hevur stuttan front, er ikki á nakran hátt til hinders fyri trygdini. Karrossaríið er væl avstívað við t.d. hátrýststáli fyri at fáa konstruktiónina so trygga sum gjørligt. Honda hevur gjørt bilin so tryggan at teir vænta at hann fær fýra ella fimm stjørnur í NCAP crasch-testunum, har fimm stjørnur eru hægsti karkaterur. Bilurin hevur 5 nakkapútur, 4 airbag, ABS við EDB, startsperru, elektriska servostýring.

### Tvær motorstøddir

Tvær motorstøddir eru at velja ímillum, ein 1.4 litur 16V við 90 hk og ein 1.6 litur 16V við 110 hk. 1.4i LS hevur aircondition og 1.6i ES hevur el-sóltak aircondition og 15" alu-felgur. Báðir motorarnir eru kvikir, krafta væl og passa væl til bilin sum vigar 1125kg : Við hjálp av Q10, sum er ein nýggj konstruktiósskipan hjá Honda, er Civic ein framúr vælgjørdur familjubilur.



*Tað, at gearstongin er flutt upp í instumentborðið og dúrkið er heilt slætt, ger at lætt er at koma runt í bilinum*




*Civic við 5 hurðum, er ein rúmligur fimm persóna bilur, ið brýtur við alla vanahugsan um ein Honda persónbil*

HONDA

## Honda Civic 1.4i 5/h

| | |
|---|---|
| Motorurin: | 4 syl 1.4 litur 16V 90 hk |
| 0-100 km/t: | 11,9 sek. |
| Bensinnýtsla: | 15,6 km/l |
| Dekkstødd: | 185/70-14 |
| Stødd og vekt: | |
| Longd | 428,5 cm |
| Breidd | 169,5 cm |
| Hædd | 149,5 cm |
| Eginvekt | 1125 kg |
| Totalvekt | 1625 kg |
| Viðførisrúm | 370 litrar |
| Prísur: | kr. 165.750,- ( 1.6i LS kostar kr.183.750,) automatgear + 20.000,- |
| Søluumboð: | Sp/f Norðbil Oyggjarvegur FO-100 Tórshavn Tlf. 313707 |



ÚT AT KOYRA

# Renault Clio klárur til annað umfar




*Fronturin á nýggja Clio minnir nógv um konseptbilin hjá Renault, Vel Satis*

**Eftir at hava verið eini trý ár á marknaðinum, og 1.7 mill. bilar eru seldir, hevur Renault Clio nú broytt útsjónd, og er klárur til eitt umfar afturat**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Í nýggju útgávuni sær Clio meira áleypandi út, og fronturin minnir um konseptbilin Renault Vel Satis. Aftan eru eisini smærri broytingar, so sum nýggjar baklyktir o.a.

Innan er nýtt instrumentborð, og nú eru fleiri møguleikar at leggja lutir frá sær. Eisini hevur bilurin fingið eina vælvirkandi elektriska servostýring.



*Instrumentborðið er nýtt, og Clio hevur nú eina vælvirkandi elektriska servostýring*

### Nýggir motorar

1.2 litur bensinmotorin við 75 hk er nýggjur, eins og ein nýggjur sera ljóðleysur common- rail turbodiesel við 60 hk, sum seinni kemur við 80 hk. Renault upplýsir at hesin dieselmotorurin koyrir 23 km/l. Bremsuassistent skipanin er frá teimum størru

Renault bilunum. Bilurin kemur á marknaðin í summar.

*Kelda: Bilen Motor & Sport*

## Rolls Royce sprongdist



Eftir at ein Rolls Royce Corniche Convertible, sum stóð hjá einum bilhandlara í USA, sprongdist, eru 480 bilar innafturkallaðir. Serfrøðingar úr Onglandi komu á staðið, og staðfestu at bilurin hevði verið úti fyri óvanligum umstøðum.

*Kelda: Bilen Motor & Sport*

## Fiat og GM



Frá 2002 av skulu Fiat og General Motors framleiða Alfa Romeo 156 á eini GM verksmiðju í Thailandi. Árliga framleiðslan verður 4000 bilar árliga. Fiat eigur Alfa Romeo.

*Kelda: Bilen Motor & Sport*

# Peugeot 107 avloysir 106 næsta ár

**Meðan Peugeot Citroën samtakið PSA, í Fraklandi eru komnir á marknaðin við ávikavist Peugeot 307 og Citroën C5, verður arbeitt við nýggjum avloysarum fyri Peugeot 106 og Citroën Saxo sum koma næsta ár**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Bilverksmiðjurnar eru av góðum grundum sparnar við upplýsingum um nýggjar bilar sum eru á veg. Spiónmyndamenn og bilteknarar eru tó altíð til reiðar at avdúka tað sum teir vita um bilarnar sum eru ávegis. Teir vænta at Peugeot 106 skiftir navn til 107, og Citroën Saxo til C3. Væntandi verður Citroën C3 at síggja á Geneve Motorshow í mars mánaða næsta ár saman við Peugeot 107.

*Kelda: FDM / Motor*




*Soleiðis væntar kendi bilteknarin DeLusi, at Peugeot 107 kemur at síggja út. Peugeot 107 og Citroën C3 verða eins og áður gjørdir við 3 og 5 hurðum*

## Bilasølan í Japan



Sølan av bilum í Japan øktist í apríl, sjeynda mánaðin á rað. Harvið sær tað út til at bilvinnugreinin er við at fóta sær eftir ta sváru búskaparkreppuna í landinum. Tey mest seldu bilmerkini er Toyota Corolla, Honda Civic og Stream, og Mitsubishi Lancer.

*Kelda: Bilen Motor & Sport*